## Skeiv kolldøming

Andreas Ivanschitz, liðskipari hjá Eysturríki, staðfesti eftir dystin, at teir høvdu havt sínar møguleikar. Vit skuldu verið á odda 2-0 eftir 20 minuttum, men bæði málini vórðu kolldømd, hóast eg haldi, at í øllum førum eitt av hesum skuldi talt við. Eftir steðgin vildu vit meira, og vit høvdu ein positivan hugburð, eftir at vit javnaðu, men tað bleiv ongan tíð nóg gott. Vit vistu, at hetta bleiv trupult, men tú fært ikki fleiri møguleikar, enn vit høvdu í Føroyum, segði Ivanschitz.



## Jákup rakti 60

Jákup Mikkelsen gjørdist leygardagin fjórði spælarin, sum hevur spælt 60 landsdystir fyri Føroyar. Óli Johannesen eigur við 82 dystum metið. Jens Martin Knudsen hevur spælt 65 ferðir á landsliðnum, og Julian S. Johnsson hevur spælt 62 ferðir. Fyrsta ferðin Jákup var í landsliðsferðalagnum var í 1988, tá ið Føroyar 24. august spældu fyrsta altjóða skrásetta landsdystin í Íslandi. Ta ferðina var Jákup eykamálverji hjá Jens Martini Knudsen. Tað var eisini í Íslandi, at Jákup fyrstu ferð vardi føroyska málið. Hetta var í vinardysti 2. juli 1995. Tá hevði hann tólv ferðir sitið á beinkinum og bíðað eftir møguleikanum. Í teimum 60 dystunum, sum Jákup hevur spælt, eru 138 mál farin í føroysku meskarnar.



*Málið hjá Boga Løkin sendi eina løtu føroysku tjóðina í eina leingi saknaða fótbóltsekstasu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fyrsta fetið úr skugganum

**Landskrona-effektin kundi neyvan verið størri enn tað sama, tá Bogi Løkin var maðurin, ið legði Føroyar á odda leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Eftir dystin var pápin og Landskrona-hetjan, Abraham Løkin, sjálvandi skjótur við einum føstum klemmi til sonin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Løkin er so avgjørt ikki tað mest vanligasta eftirnavnið í Føroyum. Tí slepst illa undan, at Bogi Løkin verður sammettur við tað, sum pápin hevur avrikað á einum fótbóltsvølli. Og tí var tað kanska eisini hóskandi, at tað var sonurin hjá einum av Landskrona-hetjunum, sum sendi Føroyar í eina nýggja ekstrasu, um enn hendan bert vardi í góðan minutt.

Eftir dystin spurdu vit Boga, um hann við hesum kendi tað, sum hevði hann stigið úr skugganum á pápanum.

- Tað vil eg ikki siga. Tað skal nokk meira til enn hetta. Men hetta var kanska fyrsta stigið í so máta.

Nú komst tú rættiliga tíðliga inn í dystin. Hvussu var tað at koma somikið skjótt á vøllin og at fella inn í spælið.

- Tað var sjálvandi ikki tað, sum eg roknaði við. Tað er jú sjáldan, at skift verður út fyri steðgin. Eg fekk kanska ein minutt ella so at hita upp í, og so var bara at fara ígongd. Sjálvandi er tað gleðiligt fyri meg, men tað er keðiligt hjá Jákupi, sum noyddist somikið skjótt av vøllinum.

- Tað, sum eg so kundi gera, var at geva tað, sum eg hevði, og eg haldi eisini, at tað riggaði OK.

**Málið**

Bogi Løkin kom sjálvandi í føroysku søgubøkurnar, tá hann smekkaði bóltin í netið til 1-0. Men hvussu upplivdi málskjúttin sjálvur hetta?

- Vit fóru niðan í álop, og vit fanga so bóltin, tá málverjin ikki ruddar nóg væl. Eg tók so eina renning inn um verjuna, og hetta sá Christian Høgni, sum legði eina perfekta avlevering innum. So hjá mær var bara at seta hann í málið.

Og tað var eingin trupulleiki?

- Eg haldi, at eg bara hugsaði á sama hátt, sum um eg kom leysur við málverjanum her heima, so eg skoraði.

Tú mátti av vøllinum einar 20 minuttir undan leikloki. Hvat var tað, sum hendi.

- Eg havi kent okkurt í lærkrikanum undir venjing, og tað kom so aftur eftir steðgin. Nú má eg so bíða til sunnudagin við at staðfesta, hvussu álvarsligt hetta er. Tað veitst tú aloftast betur dagin eftir. Men vónandi er tað ikki somikið álvarsligt, at tað forðar mær í at fara til Litva, segði Bogi Løkin.